# Vælkomin



- Korndalsgarður
- Spírin
- Ungdómshús



Eiðis kommuna bjóðar dagstovnapláss til børn í aldrinum 1 ár til og við 3. flokki.

Børn í aldrinum 1 til 5 ár ganga í Korndalsgarði.

Børn í aldrinum 5 ár til og við 3. flokki ganga í Spíranum.



# Innihald


| | |
|---|---|
| Vælkomin | 3 |
| Byrjanarsamrøða | 4 |
| Samstarv | 5 |
| Námsætlanin | 6 |
| Betri vinir | 6 |
| Tá barnið kemur og fer | 7 |
| Foreldrasamtalur | 7 |
| Frávera/sjúka | 8 |
| Kostur | 8 |
| Klæðir | 9 |
| Føðingardagar | 9 |
| Foreldraráð | 10 |
| Foreldrafundir | 10 |
| Stongt | 11 |
| Aðrar feriur og høgtíðir | 11 |
| Kostnaður og systkinafrádráttur | 12 |
| Frípláss | 12 |
| Uppsagnarfreist | 12 |
| Um Korndalsgarð | 13 |
| Upplatingartíðir | 13 |
| Um Spíran | 14 |
| Upplatingartíðir | 14 |
| Skrivligt loyvi | 14 |
| Um Ungdómshús | 15 |
| Upplatingartíðir | 15 |


# Vælkomin



Vit ynskja at bjóða tykkum hjartaliga vælkomin á stovnin. Vit gleða okkum at læra tykkum at kenna og at samstarva við tykkum. Tað er altíð ein broyting fyri barnið at byrja á stovni. Barnið møtir nýggjum umhvørvi, nýggjum børnum og nýggjum vaksnum. Tað er umráðandi, at barnið so líðandi venur seg til nýggja staðið, til starvsfólkini og hini børnini. Barnið verður tá skjótari at góðtaka alt tað nýggja og ikki minst at kenna seg trygt.

Tá ið barnið byrjar á dagstovni, verður avtalað við tykkum, hvussu vit geva barninum eina góða byrjan. Tit koma fyrst at vitja, síðan at spæla og at eta matpakka. Okkara royndir eru, at tað tekur millum 14 dagar og ein mánaða at fáa barnið at gerast trygt við nýggja umhvørvið, við okkum starvsfólk og við hini børnini. Gott er, um tit foreldur seta tykkum 2 til 3 vikur av til so líðandi at økja tíðina á stovuni. Sí meira um hetta undir brotinum; **Hvussu barnið kemur og fer.**

# Byrjanarsamrøða

Áðrenn barnið byrjar ella skjótast eftir, at barnið er byrjað á dagstovni, verða tit sum foreldur boðin til eina byrjanarsamrøðu. Vit ynskja at fáa vitan um tykkum sum familju, um heimið og um barnið, so vit kunnu møta barninum á ein skilagóðan hátt. Samrøðan tekur støði í einum leisti, ið er lagdur frammanundan av Kommunufelagnum. Vit koma at spyrja um hvussu fyrsta tíðin var, um gerandisdagin og samspælið í familjuni, um heilsuviðurskifti, um møguligan harðskap/ágang v.m. Samrøðan er eisini ein møguleiki hjá tykkum at siga okkum, hvørjar væntanir tit hava til stovnin og starvsfólkini. Starvsfólk skriva øll undir treytaleysa trúnaðarskyldu, tá tey verða sett í starv, so tað, ið tosað verður um, eru upplýsingar, sum ikki fara víðari.

# Samstarv

Tað er av týdningi, at allir partar leggja seg eftir at fáa í lag eitt gott samstarv sínámillum. Um tit ikki eru trygg við stovnin, so kann tað ávirka barn tykkara. Tí er umráðandi, at báðir partar tosa opið og beinleiðis við hvønn annan, eisini um onkur ónøgd er.
Tað kemur fyri, at barninum tørvar eyka stimbran innan ymisk øki. Um vit ella tit gerast varug við eitthvørt, er umráðandi at tosa opið saman um hetta, fyri at tørvurin hjá barninum verður nøktaður, og fyri at barnið fær teir bestu menningarmøguleikarnar. Korndalsgarður hevur í samráð við foreldrini møguleika at leita sær hjálp eitt nú frá Sernámi. (Sernámsfrøðilig ráðgeving).



# Námsætlanin

Námsætlanin er vegvísarin fyri námsfrøðiliga arbeiðinum. Høvuðsdentur verður lagdur á spæl og læru og evnini í námsætlanini eru: persónligir førleikar, sosialir førleikar, mál og samskifti, rørsla og heilsa, skapandi evnir, náttúra, umhvørvi og tøkni, siðir og mentan. Námsætlanin hongur uppi í øllum stovunum.





# Betri vinir

Betri vinir er námsfrøðiligt tilfar til børn, fakfólk og foreldur, sum arbeiða við at styrkja barnafelagsskapin – og sostatt fyribyrgja happing. Návgreiniliga arbeiðir "Betri vinir" við menningini av virðunum tolsemi, virðing, umsorgan og dirvi í barnabólkinum. Starvsfólkini hava verið á skeiði í "Betri vinir".

# Tá barnið kemur og fer

Leiðið barnið til eitt av starvsfólkunum á stovuni, tá tit koma og minnist til at siga stovuni frá, tá tit fara. (Børnini í Spíranum fylgjast tó úr skúlanum.) Hetta er neyðugt, um øll skulu kenna seg trygg, bæði børn, starvsfólk og foreldur. Umráðandi er eisini at siga okkum, hvussu barnið er fyri  - um barnið hevur sovið illa, ella um broyttar umstøður eru í familjuni so sum sjúka ella annað, sum kann ávirka gerandisdagin hjá barninum.

Fyri at barnið kann kenna seg trygt hjá okkum, er av stórum týdningi, at tey síggja tykkum fara og sleppa at veittra farvæl. Grætur barnið, troysta vit tað. Tit eru vælkomin at ringja fyri at vita, hvussu gongur.

# Foreldrasamtalur

Foreldrasamtalur eru eina ferð um árið og annars eftir tørvi. Tit eru altíð vælkomin at biðja um eina samtalu, um tit hava okkurt upp á hjartað.

## Frávera/sjúka

Tá barnið er sjúkt ella hevur frí, skulu tit siga okkum frá áðrenn **kl 09:30**. Um barnið gerst sjúkt, tá tað er á stovninum, seta vit okkum í samband við tykkum. Hevur barnið onkra barnasjúku, eigur starvsfólkið at fáa boð um hetta. Somuleiðis um barnið hevur okkurt smittandi, so sum lús, eygnabruna, barnaorm ella annað. Barnið kann ikki koma á stovnin, áðrenn tað er sett í viðgerð. Aftan á sjúku vænta vit, at barnið er frískt og kann luttaka í øllum, sum fyriferst bæði úti og inni. Vit átaka okkum ikki at geva heilivág á stovninum uttan so, at talan er um varandi sjúku.

## Kostur

Øll børn skulu hava matpakka við, og møguleiki er at fáa millummála frá stovninum.





## Klæðir

Barnið skal latast í eftir veðrinum. Barnið skal hava regnklæðir, gummistivlar og heit klæðir við hvønn dag. Tvey sett av skiftiklæðum frá innast til uttast skulu liggja í rúminum hjá barninum. Foreldrini hava sjálvi skil á rúminum hjá barninum. Minnist til at seta navn í klæðir og skógvar. Blæubørn, ið ganga á vøggustovu, fáa blæur frá stovninum.





## Føðingardagar

Tá barnið hevur føðingardag, eru tit vælkomin at hava okkurt við, so sum okkurt til matna, bøkur, spøl ella annað. So halda vit føðingardag á stovninum. Eisini ber til at bjóða børnunum heim í føðingardag í stovnstíðini. Her skal tó viðmerkjast, at tá skulu øll børnini á stovuni bjóðast.

# Foreldraráð

Í foreldraráðnum eru 3-5 limir, umframt tveir varalimir. Limirnir eru valdir fyri 2 ár í senn.

Endamálið er at fremja áhugamál foreldranna, í samráð við leiðaran á stovninum og arbeiða fyri at styrkja um samstarvið ímillum heim, foreldur, stovnin og kommunu.

Foreldraráðið skal virka fyri trivnaði millum børn, foreldur, starvsfólk og stovnin.

# Foreldrafundir

Foreldrafundur er eina ferð um árið, tá stovurnar skipa fyri og siga frá um sítt virksemi. Foreldraráðið skipar fyri felags foreldrafundi um heystið, har eitt nú val av foreldraráði er á skrá. Onkuntíð skipar stovnurin og/ella foreldraráðið fyri felags foreldrafundi, har møguleiki er fyri, at koma til fyrilestur.

# Stongt



**Korndalsgarður og Spírin hava stongt hesar dagar:**

- **Allar leygardagar og halgidagar**
- **Flaggdagin og ólavsøkudag**
- **Ólavsøkuaftan og grundlógardag frá kl 12.00**
- **Millum jól og nýggjár**
- **Ráðleggingardagarnar (tveir)**
- **Summarfrítíð (vika 28, 29, 30 og 31)**

# Aðrar frítíðir og høgtíðir

Tá skúlin hevur heyst-, jóla- og páskafrí hava fleiri børn frí. Fyri at vit kunnu leggja arbeiðið til rættis og gagnnýta starvsfólkaorkuna hesi tíðarskeið, hava vit tørv á at vita, um barnið kemur á stovn og nær. Alt eftir hvussu nógv børn koma á stovn, seta vit starvfólk í arbeiðsskema.

# Kostnaður og systkinafrádráttur

Goldið verður frammanundan (fyri tann 10. í hvørjum mánaði). Juli mánaður er gjaldsfríur. Gjøldini verða dagførd á heimasíðuni hjá kommununi **www.eidi.fo**

# Frípláss

Møguleiki er at søkja um frípláss til barnið. Frípláss verður roknað eftir inntøkugrundarlagnum árið fyri, ella um inntøkan broytist munandi í verandi ári. Umsóknarblaðið fæst á kommunuskrivstovuni. Umsóknarblaðið liggur eisini á heimasíðuni hjá kommununi **www.eidi.fo**

# Uppsagnarfreist

Uppsagnarfreistin er ein mánaði áðrenn tann fyrsta í mánaðinum. Sigast skal upp umvegis heimasíðuna hjá kommununi **www.eidi.fo**



# Um Korndalsgarð

Korndalsgarður varð tikin í nýtslu tann 18. august 2008. Í Korndalsgarði eru tvær vøggustovur við áleið 10 - 12 børnum í aldrinum 1 - 3 ár og tvær til tríggjar barnagarðsstovur við áleið 12 - 16 børnum í aldrinum 3 ár til og við 5 ár.



# Upplatingartíðir

Korndalsgarður hevur opið frá **kl. 07:00 til 17:00**. Stovnurin hevur stongt 4 vikur um summarið, millum jól og nýggjár og tveir aðrar dagar, ið verða kunngjørdir frammanundan.
Barnið skal vera á stovninum fyri **kl. 09:30**, um ikki annað er avtalað, so arbeiðið kann verða lagt til rættis.

# Um Spíran





Spírin varð tikin í nýtslu tann 15. august 2015.

Í Spíranum eru áleið 40 børn í aldrinum 5 ár til og við 3. flokki.



## Upplatingartíðir

Spírin hevur vanliga opið frá **kl. 11.30 til 17.00**. Stovnurin hevur stongt 4 vikur um summarið, millum jól og nýggjár og tveir aðrar dagar, ið verða kunngjørdir frammanundan. Tá skúlin hevur summarfrítíð, heystfrítíð og ráðleggingardagar, letur Spírin upp **kl. 7.30**. Hesar dagar skal barnið vera á stovninum fyri **kl. 09.30**, um ikki annað er avtalað, so arbeiðið kann verða lagt til rættis.

## Skrivligt loyvi

Foreldur at børnum í Spíranum skulu geva skrivligt loyvi, um barnið skal ganga heim einsamalt. Um barnið skal heim við øðrum barni, skal starvsfólkið hava boð um hetta heimanífrá.



# Um Ungdómshús

Ungdómshús varð tikið í nýtslu tann 18. novembur 2021. Endamálið við virkseminum er, at børn og ung fáa møguleika at møta vinum, spæla, samtala, hugna sær, ella gera eitthvørt, tey hava hug til, sum stimbrar áhugan hjá teimum.



## Upplatingartíðir

Týsdag er opið, fyri ungdómar úr 4., 5., 6., og 7. flokki, frá **kl. 18:00 – 21:30**.

Hósdag er opið, fyri ungdómar úr 7., 8., 9., og 10. flokki, frá **kl. 18:00 til 22:00**.

Klokkutíðir eru skiftandi, og upplatingartíðirnar kunnu broytast. Dagføringar síggjast á heimasíðuni hjá kommununi **www.eidi.fo**



**Korndalsgarður**

Foravegur 11 – 470 Eiði

**Spírin og Ungdómshús**

Gerðisvegur 2 – 470 Eiði

| Telefon | Teldupostur | Heimasíða |
| --- | --- | --- |
| +298 20 04 10 | korndalsgardur@eidi.fo | www.eidi.fo |

tonito.fo